4 leys størv hjá Demich

# Vit sóknast eftir...

## Service-leiðara til hitapumputænastuna

P/F Demich sóknast eftir einum tekniskum leiðara, ið skal standa á odda fyri og menna nýggju hitapumpudeild okkara.

Demich arbeiðir við at útvega grøna orku uppá ymiskar mátar, tað verði seg orku úr luftini, undirgrundini, yvirflatujørðini og sjónum. Vit fara nú at stovna eina sjálvstøðuga deild at taka sær av hesum økinum. Vit umboða hitapumpur av merkjunum Nibe/Vølund og Mitsubishi Electric.

Til tess at kundin kann verða tryggur í at fáa bestu tænastuna og røttu loysnina, vilja vit í nýggju deildini bjóða øllum kundum okkara service-avtalur til hitapumpir sum vit veita. Harumframt skal deildin standa fyri at seta allar hitapumpuskipanirnar upp.

## Søluráðgeva

P/F Demich sóknast eftir einum søluráðgeva ið kann vera við til at menna søludeild okkara í Havn.

Vit vilja bjóða viðskiftafólkið okkara bestu møguliga tænastuna, og vit sóknast tí eftir einum dugnaligum starvsfólki sum skal vera við til at lyfta hesa uppgávu.

Arbeiðsupgávurnar fevna í høvuðsheitunum um at gera tilboð, at avgreiða kundar og annars saman við starvsfeløgunum at gera handilin í Havn innbjóðandi fyri kundar okkara.

## Goymslufólki/bilførara

P/F Demich sóknast eftir einum røskum goymslufólki/bilførara til at umsita grovgoymslu okkara í Havn, og samstundis taka sær av útkoyring og heinting av vøru.

Vit kundu hugsa okkum eitt starvsfólk, ið hevði hug at menna hetta øki sum sítt egna, soleiðis at hann/hon kundi samskipa koyring av vøru inn og út á besta hátt, og samstundis fáa logistikkin at hanga saman á mest lønandi støði. Somuleiðis skal viðkomandi standa fyri at halda skil á grovgoymslu okkara.

## Skrivstovunæmingi

P/F Demich sóknast eftir einum skrivstovunæmingi til skrivstovu okkara í Havn at byrja 1. juni 09', ella eftir avtalu.

Sum skrivstovunæmingur kemur tú at starvast innan allar vanligar skrivstovuuppgávur, t.d. bókhald, fakturering, telefon-avgreiðslu, tolling o.a. Samstundis sum tú fært eina útbúgving, verður tú við í okkara áhaldandi stremban eftir at menna skrivstovu okkara, og mannagongdir í felagnum annars.

Meira er at lesa um størvini á www.demich.fo

Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311

Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565

Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501

demich@demich.fo • www.demich.fo

demich
hiti | vatn | sanitet